Landssjúkrahúsið

Notat til Heilsu- og innlendismálaráðið

23. april 2019

hh/frp

**Viðvíkjandi lógaruppskoti um fylgjarar til allar sjúklingar, sum verða sendir til viðgerð uttanlands**

Um allir sjúklingar skulu hava fylgjara við, so merkir hetta 1.220 fleiri fylgjarar (bygt á aktivitetin í 2018).

| **Meting av eykakostnaði fyri eyka fylgjarar** | |
|---|---|
| Tal av sjúklingum uttan fylgjarar 2018 | 1.220 |
| | |
| Ferðaseðlaprísur í miðal | 2.816 kr. |
| | |
| Kostnaður fyri ferðing hjá fylgjarum | **3.435.520 kr.** |
| | |
| Gistingar hjá sjúklingum uttan fylgjara 2018 | 10.480 |
| | |
| Gistingarkostnaður CabInn | 600 kr. |
| Flutningsútreiðslur | 80 kr. |
| | |
| Kostnaður fyri eyka gistingar | **7.126.400 kr.** |
| | |
| **Kostnaður fyri ferðing hjá fylgjarum** | **3.435.520 kr.** |
| **Kostnaður fyri eyka gistingar** | **7.126.400 kr.** |
| **Kostnaður samlað** | **10.561.920 kr.** |

Henda meting er gjørd eftir teimum fyritreytum, at sjúklingahotellið ikki hevur pláss fyri hesum eykagestum, tí í 2018 hevði Sjúklingahotel Tórshavn nærum 100 % belegning alt árið.

Í 2017 vóru møguleikarnir kannaðir um tað bar til at økja kapacitetin hjá Sjúklingahotellinum í Keypmannahavn, og niðurstøðan var, at hvørki í verandi bygningi ella nakrastaðni nærhendis var møguligt at skapa eyka kapacitet.

Um vit ganga út frá, at omanfyrinevndu eyka fylgjarar koma aftrat í Keypmannahavn (har nógv teir flestu sjúklingarnir eru), skulu hesir fylgjarar hýsast á vanligum hotellum. Í slíkum førum brúkar sjúklingahottellið ofta CabInn, har prísavtala er gjørd á 600 kr. pr.

**Uttanlandstænastan**
J.C. Svabosgøta 41-49, FO-100 Tórshavn, Tel. (+298) 304500 fax 314253 www.ls.fo, ls@ls.fo

nátt. Hetta er tó treytað av at kømur eru tøk. Harafturat koma flutningsútreiðslur, sum í hesari meting eru ásettar til 80 kr. pr. dag.

Afturat hesum kemur kostnaðurin av einari øktari umsiting, tá tað koma 1.220 fleiri fylgjarar.

Tann samlaði árligi kostnaðurin á 10.561.920 kr. má metast at vera ein minsta-útreiðsla, tí fyri sjúklingar og fylgjarar sum skulu aðrastaðni enn til Keypmannahavnar má roknast við einum enn hægri miðalkostnaði.